KÍ-GÍ:

# Oddastríðið upp á spæl

**Bæði KÍ og GÍ hava stig fyri neyðini, um tey skulu fylgja við í oddinum**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Tað mundi koma illa við hjá KÍ, at teir bert fingu javnleik í heimadystinum móti EB/Streymi. Tað ætla tey at gera betri hesaferð, nú GÍ kemur á vitjan, og hagtølini siga í øllum førum, at tað ofta hevur verið málríkt, tá hesi bæði liðini takast.



*Ofta plagar talan at vera um spennandi og undirhaldandi uppgerðir, tá GÍ og KÍ takast*

### Skaddir útlendingar

Klaksvíkingarnir eru tó nakað skerdir undan uppgerðini. Jacob Bymar hevur drigist við skaða, men varð tó skiftur inn seinast, men í vikuni varð hann av nýggjum skaddur. Talan er um skaða í lærkrikanum, og í Klaksvík rokna tey ikki við, at hann verður tøkur fyrstu tvær vikurnar.

Heldur ikki verður mett, at Marek Wierzbicki er tøkur. Hann hevur drigist við fipurskaða, og enn er hann ikki komin somikið fyri seg, at hann verður mettur at tola 90 harðar minuttir á miðvøllinum.

Hinvegin er Ove Nysted nú um at koma rættiliga í snúningar, og møguleiki er fyri, at hann kemur inn í verjupartinum, eftir at tað annars var sum álopsleikari, at hann kom á vøllin seinast.

Júst álopsparturin man annars vera nakað, sum tey í KÍ tosa um at hvessa, tí sambært heimasíðuni hjá Norðlýsinum, so er felagið í løtuni í samráðingum við Súna Fríða Barðá.

### Málini resta

Í Gøtu mistu tey oddasessin við tapinum fyri B36, men ætlanirnar eru framvegis at stríðast í oddinum.

– Tað gekk ikki so væl hjá okkum handan dystin, og tað er einki at ivast í, at vit fara til Klaksvíkar at vaska tapið av okkum, sigur Súni Olsen, sum aftur í ár verður roknaður millum álitini á GÍ-liðnum.

Um uppskriftina til hetta sigur Súni, at teir fyrst og fremst mugu gerast meira vandamiklir.

– Eg haldi sjálvur, at innsatsurin hjá leikarunum var í lagi, men spælið var ikki nóg gott, og vit skaptu tískil ov lítið. Vit hava heldur ikki skorað nú í tveimum dystum, og tað mugu vit so í øllum førum broyta, heldur hann.

GÍ hevur annars allar leikarar tøkar til dystin. Eingir skaðar gera um seg í hópinum, og leikbann hava teir so ikki kent nakað til enn, so Krzystof Popczynski hevur frítt val, tá hann skal gera av, hvørjir teir fyrstu ellivu skulu verða.

B68-Skála:

# Renna framvegis undan botninum

**Á Skála siga teir seg ikki hugsa um annað, enn at halda seg burtur frá botnplássinum, sum mótstøðuliðið hesa ferð røktar**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*

Tað vendir heilt øðrvísi hesa ferð, enn tað gjørdi í fjør. Tá var B68 við í kappingini um oddasessin, meðan Skála stríddist fyri at sleppa undan aftasta sessinum. Nú er Skála saman við B36 oddalið, meðan B68 er aftast og einasta liðið, sum enn ikki hevur fingið stig.

Men hóast Skála hevur lagt bragdliga fyri, og tað hevur gingið væl, so er royndi venjarin, Johan Nielsen, ikki farin at hugsa um gullkrónur og FM steyp.

– Tað hevur roynst væl hjá okkum higartil. Men vit hava ikki broytt málið. Tað er at halda okkum burtur frá niðastu plássunum. Higartil hevur hetta eydnast væl, men eg rokni við, at talan verður um torføra uppgávu á Toftum, har teir sjálvandi eru svangir eftir stigum, sigur Johan Nielsen.

Hví heldur tú, at tað hevur gingið so væl í ár?

– Spælararnir hava fleiri royndir. Teir eru meiri vanir við 1. deildarfótbólt, sum er øðrvísi enn í lægru deildunum. Teir tora at bjóða seg fram, teir tora at hava bóltin, og teir megna harvið at sleppa sær skilagott av við hann aftur. Tá ið sjálvsálitið fær eitt skump rætta vegin, verður tað eisini lættari at fáa mál, tá ið møgleikarnir koma. Hesum gekk tað einki serligt við í fjør, staðfestir royndi Skála venjarin.

Allir spælararnir hjá Skála eru tøkir. Tað er ikki frítt, at tað er kapping um plássini. Ronni Hansen og Puja, sum teir rópa hann, vóru uttanfyri síðst saman við málverjanum Heina Kristiansen. Hesir trýsta allir fyri at sleppa á liðið.

Á Svangaskarði siga teir seg hava gott mót. Nýggi bulgarski álopsspælarin hevur vant saman við hinum í B68. Enn eru loyvini ikki komin upp á pláss, so hann verður ikki við ímóti Skála. Bulgarski spælarin royndarvenur á Svangaskarði. Okkum kunnugt hevur B68 ikki enn skrivað sáttmála við fremmanda mannin.

Allir teir somu, sum spældu ímóti NSÍ sunnudagin, eru tøkir hesa ferð. Nú er nakað síðani, at teir sóu Súna Fríða Barðá á Svangaskarði. Heimasíðan hjá Norðlýsinum visti í gjár at siga, at hann samráðist við KÍ um samstarv.



fk Mat-seðilin

Fríggjadagin 21. mai:
**Nakkasteik**

Leygardagin 22. mai:
**Rullusteik**

Mánadagin 24. mai:
**Gjørda haru**

Týsdagin 25. mai:
**Stoktan fisk**

Mikudagin 26. mai:
**Lasagne**

***

**Seinnaparts-TILBOÐ**
frá kl. 14.00:

**Juniorburgari 22,00**
**Maxiburgari** *ella*
**Búffsandwich 30,00**

Matstovan í Hoyvík

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen

*Koyrt verður leygarkvøld:*

**Vágaleiðin (tlf. 217753)**
• Úr Vágunum — *bert eftir avtalu*
• Tórshavn - Vágar — kl. 04.30

**Vestmannaleiðin (tlf. 217752)**
• Vestmanna - Tórshavn — kl. 23.30
• Tórshavn - Vestmanna — kl. 00.30
• Vestmanna - Tórshavn — kl. 03.30
• Tórshavn - Vestmanna — kl. 04.30

(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð eftir avtalu)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Tlf. 424254



AUTO 311234
Dag og nátt - Alt døgnið



LAT OKKUM KOYRA TEG TIL OG FRÁ
VIT KUNNU EISINI KOYRA ØRINDIR FYRI TEG
BENZIN · DIESEL · KIOSK
Talutíðarkort: Kall · Føroya Tele
AUTO
TEL 311234






MAERSK AIR
FRÍGGJAKVØLDIÐ 21. MAI
GUNNAR MIKKELSEN UNPLUGGED
CAFÉ NATÚR

SHOWMENN LIVE

FRÍGGJAKVØLDIÐ 21.05
ÓKEYPIS ATGONGD
til klokkan 24.00
& ½ PRÍSIR
til klokkan 24.00
PLATFORM
discotheque
MAERSK AIR

Manhattan
PUB & CAFÉ
í vikuskriftinum
Hóskvøldið
Livandi tónleikur við
DéJà Vu
DOUBLE UP
til kl. 22.00
Fríggja- og leygarkvøldið
Livandi tónleikur við
Eyðun & Jonas
Allar dagar opið frá kl. 18.00
Manhattan
PUB & CAFÉ
Sverrisgøta • Tórshavn
Tel 31 96 96

Klubbadansur
Leygarkvøldið spælir
EXPRESS
HAVNAR KLUBBI
Stovnaður 1799


BÍLEGG PIZZA
FRÍGGJANÁTT
OG
LEYGARNÁTT
HEIMKOYRING ALLA NÁTTINA
PIZZA 67
TEL. 35 67 67

felagið
Tórshøll
Í vikuskiftinum spæla
TARTA
(Kristi himmalferðardag er opið frá kl. 19-24)
Týsdagin 25. mai kl. 19.00
Sjavskapping
Fríggjakvøld hava konufólk ókeypis atgongd til dans





club KAGGIN
Hóskvøldið
Stongt
Fríggjakvøldið
BASALT
Leygarkvøldið
BASALT
www.kaggin.fo